ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.



# Sethús á Eiði

Um hóskandi boð fæst, verður setahúsaogn við hjalli við hesum lýst til sølu.

Talan er um grundøki uml. 357 m² við ástandandi sethúsum og hjalli.

Húsini eru upprunaliga bygd uml. 1916. Grundvíddin er 47 m². Kjallarin óinnrættaður.

**Miðhædd:** Køkur, tvær stovur, gangur og wc.

**Loft:** Trý kømur.

Húsini eru nakað dagførd, men treingja til ávísar ábøtur. Húsini standa mitt í bygdini, og útsýnið er sera gott.

Sethúsaognin er partur av matr. nr. 164 a, Eiði. Ognin er undir sundurbýti í løtuni, og jørðin, sum í dag er partur av samlaðu ognini, fylgir sostatt ikki við í søluni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, frp@jura.fo ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen, aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**

# KUNNGERÐ

## um byggisamtykt í Kvívík

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at bygdarráðiði Kvívík á fundi tann 08-03-2010, samtykti, at broyta almennu byygisamtyktina fyri Kvívíkar kommunu 2007-2015, soleiðis:

- Partur av matr.nr. 144a á Stykkinum verður lagt út sum byggiøki
- 2 broytingar á matr.nr. 21a í Leynum, soleiðis, at 2 partar verða lagdir út sum byggiøki
- Matr.nr 192 verður broytt frá at vera alment tænastuøki til at vera bústaðarøki

Skjøl, sum vísa broytingina, liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Kvívík frá mikudegnum 17. mars til týsdagin 06. apríl 2010, báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga vera kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 27. apríl 2010.

**Kvívíkar Kommuna**
**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**

## Reyði Krossur Føroya

# Aðalfundur

Reyði Krossur Føroya hevur aðalfund
**sunnudagin 21.03.10, kl. 15:00**
í Húsinum hjá Reyða Krossi,
Bryggjubakki 10, Tórshavn

Uppskot at viðgera á aðalfundinum skulu sendast til formannin í seinasta lagi 2 vikur undan aðalfundin.

Allir limir hava rætt at møta.

**Limagjaldið fyri húski er kr. 150,-**
**og feløg/stovnar kr. 400,- fyri ár 2010**

Kann gjaldast i øllum peningastovnum.

Boks 1015 · 110 Tórshavn · Redcross@Redcross.fo

# Hygg HER

**Nú er várið í hond. Skalt tú velta tær havan, javna ójavnar, grava út fyri garði, oljutanga, rottanga, gera rennur ella annan maskingrevstur fyri sámuligan prís.**

**– Ring 28 41 56 og vit kunnu tosa saman.**

**HEÐIN BERTELSHEN**
**Bóndaheygur 13 · 100 Tórshavn**

## ÚTLENDINGASTOVAN

IMMIGRATION OFFICE

# Tíðaravmarkað skrivstovustarv á Útlendingastovuni

Útlendingastovan søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi. Starvstíðin verður frá 1. apríl 2010, ella skjótast gjørligt her eftir og til 1.mars 2011. Starvið er parttíðarstarv við starvsbrøki á 0,75.

**Um starvið :**
Høvuðsuppgávurnar verða :
- at hava um hendi alt vanligt skrivstovuarbeiði
- at passa telefon og avgreiða viðskiftafólk
- at føra journal
- at innheinta upplýsingar í samband við málsviðgerð

**Førleiki**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving ella royndir.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, vera ábyrgdarfullur og røkin, kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava áhuga í at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarin skal hava góðan málkunnleika í føroyskum, duga væl enskt og hava góðan teldufførleika.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal sendast til:

Útlendingastovuna
Boks 220
N. Finsensgøta 10, 3 hædd
100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Útlendingastovuni í hendi í seinasta lagi 22. mars 2010.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gurið Joensen, stjóra, á tlf. 357979.

**Um Útlendingastovuna** Útlendingastovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin gevur ummæli til danska Udlændingeservice uppá umsóknir um familjusamanføring og arbeiðs- og uppihaldsloyvi frá útlendingum, sum ynskja at koma til Føroyar. Útlendingastovan vegleiðir eisini um viðurskifti á útlendingaøkinum. Á stovninum eru 3 starvsfólk: stjórin, 1 málsviðgeri og 1 skrivstovufólk.




# Hevur tú hund?

So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL

**SPECIAL – 20 kg kr. 450,-**

Turrfóður til vaksnar hundar. Sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.

**Bílegg beinleiðis á netinum**

**www.fodursolan.com · info@fodursolan.com**